# Íslendingar 312.000 í tali

Tann 1. desember kom íslendska fólkatalið upp á 312.872, og sostatt eru íslendingar vorðnir umleið 5.600 fleiri í tali enn fyri einum ári síðani. 3.000 fleiri fólk eru flutt til Íslands enn úr Íslandi í ár, og barnsburirnir hava verið 2.600 fleiri enn andlátini. Tey seinastu árini er íslendska fólkatalið vaksið rættiliga skjótt, men hagstovan í Reykjavík sigur, at vøksturin er minkaður í ár og verður ætlandi 1,8 prosent. Í fjør var hann 2,6 prosent.

# Russar naskaðust á jólum



Bæði danska og finska flogvápnið sendu um jólini flogfør á flog, tí russisk hernaðarflogfør flugu inn í norðurlendskt loftøki. Russisk flogfør hava í hesum árini verið sera virkin í norðurlendskum loftrúmi. Ferð eftir ferð hava russisk hernaðarflogfør flogið tætt fram við markinum hjá norðurlondum, og fleiri ferðir eru flogførini eisini farin um markið. NRK heldur seg vita, at norska verjan 84 ferðir í ár hevur staðfest, at russisk flogfør hava flogtið tætt upp at norskum loftøki, og um jólini máttu bæði danska og finska verjan senda flogfør avstað, tí russisk flogfør komu um markið. Fyrr í ár hava russisk stríðsflogfør eisini verið í nánd av føroysku loftøki.



*Jákup N. Olsen, formaður í sjúklingaráðnum, metir, at fleiri sjúklingar fara at kæra, tá endurgjaldslógin kemur í gildi, tí í dag er tað sjúklingurin sjálvur, sum skal prógvað, at feilur er gjørdur*

# Bíða leingi eftir endurgjaldsábyrgd

**Jákup N. Olsen, formaður í sjúklingaráðunum, sum ráðgevur landsstýrismanninum um neyðugar lógarbroytingar innan heilsuøki, sigur, at føroyska sjúklingatrygdarlógin frá 1999 ikki virkar eftir ætlan, tí lógin ikki ger mun einsamøll**

HEILSA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Tað eru tríggjar samanhangandi lógir, sum í Danmark tryggja, at heilsuverk og heilsustarvsfólk hava ábyrgd fyri tí, sum tey gera, og at sjúklingar hava eina veruliga viðgerðartrygd.

Hesar lógir eru sjúklingatrygdarlógin, endurgjaldsábyrgdarlógin og vanlukkutryggingarlógin. Í Føroyum var tann fyrsta av hesum sett í gildið í 1999. Men hon munar einki einsamøll, tí hinar báðar tryggja, at sjúklingurin fær endurgjald.

Úrslitið er, sambært Jákup N. Olsen, formanni í sjúklingaráðnum, at sjúklingurin framvegis sjálvur skal prógva, at hann hevur fingið skeiva viðgerð.

- Høvdu allar tríggjar lógirnar verið galdandi, hevði tað verið bæði lætt og skjótt at útgreina, um heilsuverkið hevði ábyrgd fyri feilum, og sjúklingurin hevði fingið endugjald. Men tíverri eru lógirnar enn ikki settar í gildið hjá okkum, staðfestir Jákup N. Olsen.

Hann metir, at allir partar í dag eru greiðir yvir, at vit hava brúk fyri at seta hesar lógir í gildi, og ætlanir hava eisini verið at fáa tær samtyktar í løgtinginum, men samgongan náddi tað so ikki í farandi skeiði.

- Um hesar lógir vórðu samtyktar, høvdu vit sæð fleiri kærur, tí í dag er skipanin so tung, at sjúklingar orka ikki at fara í holt við at kæra, sigur Jákup N. Olsen.

Í dag má sjúklingurin sjálvur seta í sivilt rættarmál í gongd fyri at fáa staðfest, at hann skal hava endugjald. Men undir donsku lógunum, er tað bara ein spurningur um, hvussu stór endurgjaldsupphæddin skal vera.

# Eingin eigur at lata seg skurðviðgera í Føroyum

**So hørð eru boðini frá fyrverandi formanninum í Sjúklingafelag Føroya, John Eysturoy. Grundin er, at í Føroyum hevur tú onga rættartrygd, men tað hevur tú í Danmark. Og tí heitir hann á allar føroyingar at krevja at fáa sína viðgerð í Danmark**

HEILSA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Sverri Nilssen má seta eitt sivilt rættarmál í gongd sum skjótast. Annars er málið fyrnað, og hann fær einki endurgjald, og heilsuverkið fær onga átalu.

Hetta sigur John Eysturoy, fyrrverandi formaður í Sjúklingafelag Føroya. Hann greiðir frá, at av tí at sjúklingatryggingin ikki er sett í gildið í Føroyum, eru fólk sjálvi noydd at leggja sak móti heilsuverkinum.

- Fyrningarfreistin í slíkum málum er í dag bara tvey ár, og tí má eg bara heita á hendan sjúklingin at seta gongd í eitt sivilt rættarmál sum skjótast. Heilsuverkið ger einki av sær sjálvum, sigur John Eysturoy, sum sjálvur saksøkti heilsuverkið og fekk viðhald og endurgjald. Men rættarmálið tók fýra ár.

- Eg veit um nógv, sum ikki orka í gongd við slíkt, og tí eru tað bara heilt fá mál, sum síggja dagsins ljós, sigur hann.

### Sjúklingar hildnir gíslar

Politikarnir halda sjúklingum og eldri sum gíslar við ikki at seta sjúklingatryggingarlógina í gildi í Føroyum. Hetta er skoðsmálið hjá fyrrverandi formanninum í sjúklingafelagnum av føroysku politisku skipanini.

Danmark hevur í fleiri ár havt lógir um sjúklingatrygd, sum gera tað lætt hjá sjúklingum at kæra um læknafeilir og skeivar viðgerðir. Men í Føroyum skal sjúklingurin einsamallur stríða seg í gjøgnum rættin fyri at prógva, at heilsuverkið hevur gjørt okkurt skeivt.

Sjálvur hevur John Eysturoy fingið skurviðgerðir í knæ og rygg eftir rættarmálið, og í báðum førum kravdi hann at verða viðgjørdur í Danmark.

- Eg havi mist álitið á føroysku skipanini, og eg veit, at um ein feilur hendir í Danmark, so fær sjúklingurin endurgjald og læknin eina átalu. Tí er tað nógv tryggari at verða viðgjørdur niðri, sigur John Eysturoy.

## Landslæknin einki við endurgjald at gera

Tá føroyskir sjúklingar kæra um viðgerðir í føroyska heilsuverkinum, kunnu teir senda kæruna til Landslæknan, sum so sendir kæruna víðari til danska sjúklingakærunevndina

Á heimasíðuni hjá Landslæknanum, www.landslaeknin.fo stendur soleiðis:

- Sendir tú kæruna til Sjúklingakærunevndina í Keypmannahavn, so fer Sjúklingakærunevndin at senda eina áheitan til Landslæknan um at innheinta frágreiðing frá viðkomandi heilsustarvsfólki ella fólkum umframt at biðja um tilfar so sum útskrivingarbrøv, røntgenmyndir o.a. sum kann lýsa málið.

- Tá Landslæknin hevur fingið alt tilfarið, verður gjørdur ein samandráttur av málinum og yvirlit yvir øll skjøl í málinum. Síðan verða øll skjøl og annað viðkomandi tilfar sent niður til Sjúklingakærunevndina sum viðgerð málið og tekur avgerð um, hvørt heilsustarvsfólki sum kært er um, skal hava átalu ella ikki.

Landslæknin, Høgni Debes Joensen, sigur tó, at hann sum embætisfólk einki hevur við endugjaldsmál at gera.

- Eg eri bara inni í málinum, tá sjálv kæran verður viðgjørd av sjúklingakærunevndini. Tá endaliga avgerðin er tikin, havi eg ikki longur nakað við málið at gera, sigur hann.

Tá er tað sjúklingurin sjálvur, sum skal fylgja málinum upp, um hann ynskir, at viðhald í kæru skal nakrar avleiðingar.